# Ein virkin tilvera fekk ein bráan enda

Til á jólum í 1999, var Páll Vang ein maður við nógvum jørnum í eldinum.

Eftir at hann fekk litið upp í hendurnar at manna landsstýrið fyri Fólkaflokkin frá 1981-1985, varð hann eisini valdur í Tvøroyrar Býráð. Har kom hann beinanvegin í samgongu og eftir valið í 1992, bleiv hann borgarstjóri.

Sostatt var tað Páll Vang, sum stóð við róðrið á Tvøroyri, tá ið ringasta kreppan í søguni legði alt landið lamið.

Í politikki skerst ikki burtur, at tann skeiva gongdin í Suðuroynni, og í útjaðaranum í Føroyum sum heild, bæði vinnuliga og í fólkatalinum, nívdi hann almikið og hann gjørdi tað til sítt hjartamál at fáa vent gongdini.

Tað dylist heldur ikki, at hann sá eina komandi oljuvinnu sum fremsta møguleikan at fáa vent gongdini í Suðuroynni og hann legði tí eitt stórt arbeiði í at fáa oljuvinnuna til Suðuroyar.

Stóri ansur hansara fyri útjaðaranum í Føroyum gjørdi hann næstan sjálvskrivaðan til formann í Býarfelagnum, sum seks tær størstu kommunurnar skipaðu og tað var í hansara formanstíð, at kommunali veðhaldsgrunnurin kom, sum lætti munandi um skuldina hjá teimum ringast staddu kommununum og hevur gjørt tær førar fyri at koma víðari.

Í frítíðini var tað serliga seyður og seyðahald, sum hevði hansara stóra áhuga og hann hevur nógvan seyð sjálvur.

Men Tollaksmessudag 1999 fekk alt hetta ein bráðan enda.

Kona hansara, Elin, minnist, at Páll Vang var í sera góðum hýri hendan dagin. Ikki minst fegnaðist hann um, at skattaprosentið á Tvøroyri loksins varð lækkað 0,25%.

Men um náttina bleiv hann illa sjúkur og fór á Suðuroyar Sjúkrahús, haðani hann beinanvegin varð fluttur á Ríkissjúkrahúsið, har hann varð lagdur undir skurð 3. jóladag.

Sjálva nýggjarsnátt, tá ið heimurin trein inn í nýggju øldina, versnaði sjúkan aftur.

Hesa løtuna stóð so illa til, at læknarnir fyrireikaðu tey avvarðandi upp á tað ringasta og ongin væntaði, at hann fór at klára tað.

Men hann gav ikki skarvin yvir og sjey dagar aftaná, vaknaði hann aftur.

Kortini varð greitt, at heilabløðingin hevði gjørt so nógv um seg, at neyðugt var við miðvísari og drúgvari venjing fyri at vinna nakran førleika aftur.

Í Føroyum vóru syndarligar umstøður til fólk við heilaskaða, men Páll Vang var so heppin at sleppa á sera framkomnu venjingarmiðstøðina Dianalund, sum hevði ment ein nýggjan hátt at venja illa heilaskadd fólk upp aftur.

- Eg vildi aldrin trúð, at tað var so ringt at blíva álvarsliga sjúkur í Føroyum, segði hann við Sosialin fyri nøkrum árum síðani.

Men so slapp hann á sambýlið í Niðarugøtu og sum tað sæst á øðrum greinum her á síðuni, var tað eitt stórt framstig.

Har hevur hann fingið so góðar og miðvísar venjingar, at hann nú er til reiðar at flyta heim aftur á Tvøroyrar.

Men stúrir hann so fyri, at spariætlanirnar hjá landsstýriskvinnuni í almannamáklum fara at forkoma hansara størsta ynski.



**PÁLL OG MAERSK**

*Í sínum vælmaktsdøgum var Páll Vang ein av okkara heilt markantu politikarum, ikki minst gjørdi hann vart við seg í lokalpolitikki. Sum býráðslimur og borgarstjóri á Tvøroyri og sum formaður í Býarfelagnum, brendi hann serliga fyri at bøta um umstøðurnar hjá útjaðaranum. Hann legði stóra orku í at fáa oljuhavnina til Suðuroyar og eitt úrslit av tí var, at sjálvur Maersk McKinney Møller var á Tvøroyri og vitjaði síðst í nítiárunum*

# NÚ ORKI EG IKKI MEIR



**SPARINGAR** Tá ið Páll Vang hoyrdi um ætlanin at spara átta pláss burtur á Suðuroyar Ellis og Røktarheimi, fór hann fullkomiliga í svart, tí nú sær hann sítt størsta ynski fjara burtur

Áki Bertholdsen

– Nú sleppi eg ongantíð suður aftur!

Hetta var fyrsti tankin ið fór ígjøgnum høvdið á Páll Vang, tá ið hann frætti um ætlanina hjá landsstýriskvinnuni í almannamálum um at gera átta tveymannakømur á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi um til einmansstovur.

Tað merkir í veruleikanum, at átta búpláss á eldraøkinum í Suðuroy skulu sparast burtur.

Hetta er ein sparing, sum skal setast í verk næsta ár.

Hesi tíðindi komu ómetaliga dátt við hjá Páll Vang á Tvøroyri.

Eftir eina herviliga heilabløðing á jólum 1999, tá ið Páll Vang bara var 50 ára gamal, býr hann nú á sambýlinum í Niðarugøtu í Hoyvík, sum er ætlað fólki við seinheilaskaða.

– Mítt allarstørsta ynski er at sleppa suður aftur í heimbygdina at vera og at fáa pláss á Suðuroyar Ellis og Røktarheimi, sigur Páll Vang.

**» Tað var sum at vakna til eitt nýtt lív**

Men hann ásannar, at nú hann frætti um ætlaðu sparingarnar, sær hann samstundis sítt ynski fjara burtur.

Nú stúrir hann fyri, at tað kann taka fleiri ár, áðrenn nakað pláss verður tókt til hann á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi.

– Hetta var ein ógvuliga dyggur smeitur, tí eg má viðganga, at mær leingist so ómetaliga illa suður aftur, sigur hann.

– Men nú orki eg ikki meiri, leggur hann afturat.

### Fekk góða hjálp

Fyrstu tíðina eftir, at hann var blivin sjúkur, vóru umstøðurnar ikki nakað serligar. Tað mesta av tí fyrsta árinum lá hann í coma, men fyri einum 10 árum síðani kom hann á sambýlið í Niðarugøtu.

Tá ið hann kom á Sambýlið, var hann rættiliga illa fyri, bæði likamliga og sálarliga, minnist kona hansara, Elin.

– Hann kundi einki, og hann vildi onki. Lá bara og svav døgnið runt.

– Men á Sambýlinum var eitt lið av væl skikkaðum og sera dugnaligum pedagogum sum eisini vóru kærleiksfullir og, ikki minst, vóru lættir av lyndi og stuttligir.

Elin Vang sigur, at hetta er